## DAGSINS MEINING

# Søguligur sigur - sigur fyri samhaldsfesti

Fyri fyrstu ferð í søguni hjá bretska arbeiðaraflokkinum endurvann hann stjórnarvaldið á einum parlamentsvalið. Tað merkir, at Tony Blair og flokkur hansara fáa í hvussu er fýra ár afturat at uppbyggja og umskipa bretska samfelagið frá einum djúpt konservativum klassasamfelagið til eitt meiri nútímans vælferðarsamfelag. Hetta vísti valúrslitið, og hetta er tað, sum tann bretski veljarin letur koma fram, tá tosað verður aftur og fram um samfelagsskipanir.

Valúrslitið vísir greitt, at tann vanligi bretin vendir sær frá tí konservativu samfelagsskipanini. Ikki bara tann vanligi løntakarin, gamli arbeiðaraklassin, men eisini meðalklassin, sum er betri fyri. Og her liggur kjarnin til valsigurin hjá Labour-flokkinum fyri fýra árum síðani. Hann fekk tann avgerandi meðalklassan í sín part, og tann stóri meðalklassin valdi aftur hesuferð Labour, tí hann vil hava eitt samfelag fyri øll.

Men hvørki hesin, ella seinasti stórsigurin hjá Labour, komu av sær sjálvum. Lykilin var ein umskipan í flokkinum. Var tað ikki eydnast teimum meiri miðsøkjandi yngru kreftunum í flokkinum at fáa leiðsluna í flokkinum, hevði hann verið runnin í stein, og havt torført at komið í stjórn aftur. Men tað ótrúliga hendi, at Labour vann ikki bara aftur, men at sigurin er líka so stórur sum seinast, og tað er ein sensatión í sjálvum sær.

Tað er sum afturljóð frá farnum tíðum, tá vit nevna orðið klassasamfelag, men í mangar mátar er Ongland framvegis landið hjá teimum privelegeraðu. Men her ein broyting, og í dag hevur bretski veljarin fyrst og fremst áhuga í at fáa tey dagligu viðurskiftini sum íbúðavirðurskifti, heilsuverk og skúlaskap upp á eitt hægri stig, so Bretland kann sametast við vælferðarsamfeløgini í Norðurlondum og tey fremstu ídnaðarlondini í Evropa.

Vit hava politisk rák, og ikki skerst burtur, at vit hava havt eitt sosialdemokratiskt rák seinastu árini. Sosialdemokratiskar stjórnir sita í flestu londum í Evropa og í næstan øllum ES. Borgarigu stjórnirnar, sum grundaðu politikk sín á monetaristiska búskaparpolitikkin, kundu ikki nøgta samfelagsliga tørvin hjá tí vanliga borharanum. Gongdin í Evropa og valúrslitið í Bretlandi er aftur eitt boð um, at evropeiskir veljarar sláa mannagrð um ta samhaldsføstu hugsjónina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eg meini tað –

**Signar á Brúnni**



Nú nýggjur landsstýrismaður í mentamálum er valdur, eru tað mong, ið hava spurt meg, hví eg ikki tók av tilboðnum um at fara í landsstýrið aftur, um orsøkin var hon, at eg ynskti ikki, at nú fráfarni landsstýrismaðurin ikki skuldi gerast tingmaður í mítt stað. Til hetta er at siga, at eg havi ikki fingið tilboðið, soleiðis sum mær varð lovað tann 28. mars ár 2000, tá eg segði meg frá sum landsstýrismann, orsakað av tí nógv umrødda sjónvarpsmálinum.

Tað eru eisini tey, ið spyrja, um eg nú veruliga fekk hetta lyfti, ið eg havi nevnt fleiri ferðir. Eg skal enn einaferð taka uppaftur, at tað varð mær lovað, og tað var nógv frammi í fjølmiðlunum tá.

Áhugavert er at lesa ymiskt av tí, ið tá varð sagt av m.ø. tjóðveldismonnum. Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, segði við Sosialin:

»Hevur hann ikki gjørt nakað skeivt, so eigur støðan at vera nullstillað og Signar á Brúnni settur í landsstýrisstarvið«.

Beint eftir at eg var farin úr landsstýrinum, var flokssting Tjóðveldisfloksins hildið í Vágum, og sum væntandi var, varð hetta ólukkumál umrøtt. Serliga áhugavert er at lesa tað, ið táverandi formaður í aðalstjórn floksins, vegna aðalstjórnina, Óli Holm, hevði at siga. Skal bert taka brot úr frágreiðingini:

»Tá so eitt mál av so prinsipiellum karakteri sum sjónvarpsmálið kemur í ljósmála, har ivi verður sáddur um embætisførsluna hjá landsstýrismanni okkara í Undirvísingar- og Mentamálum, er umráðandi, at ting- og landsstýrismanningin viðger hetta við tí neyðuga skynsemi og fyriliti. Vit føla okkum sannførd um, at Signar á Brúnni ikki medvitandi hevur borið seg skeivt at. Vit eru eisini fullgreið yvir, at einki vet av sjálvsøkni finnst í avgerðini hjá landsstýrismanninum um at flyta sjónvarpinum pening. Vit kenna til onnur mál, har landsstýrismenn hava verið úti í sera ivasomum avgerðum. Vit eiga hinvegin eisini at hugsa um, at flokkur okkara er slóðari fyri eini gongu, ið setir alt sítt álit á okkum og førleika okkara at veita fullveldinum Føroyar ta neyðugu rættartrygdina og vera tí eisini noyddir at ganga á odda at taka tær neyðugu avleiðingarnar, tá minsti ivi verður sáddur um brot á rættartrygdina.

Signar hevur við ósjálvsøkni avgerð síni skapt stóra virðing millum manna fyri flokkinum eins og sínum egna persóni og vil framyvir standa sum undangongumaðurin, ið vísti neyðugu virðingina fyri løgum og rættartrygdum landsins. Tílíkt skapar virðing, tryggleika og álit á, at vit hava neyðuga førleikan at taka ábyrgd av framtíðarsamfelagi okkara.» (sitat endað)

Kann ikki lata vera við at endurgeva brot úr grein, ið Torbjørn Jacobsen skrivaði um hetta mundið, ið var eitt aftursvar til Dagfinn Danbjørg, sum ikki heilt er ólíkt tí, ið aðalstjórn floksins bar fram í Vágunum. (Eg endurgevi).

»Tá ið Signar heitti á løgmann um at verða loystur úr starvi, skrivaði hann søgu. Og við hesi avgerðini kemur hann at standa sum ein varði í politisku søguni – til ævigar tíðir. Alt kann tykjast eitt sindur órógvandi í løtuni. Maðurin handlaði ivaleyst út frá vánaligari ráðgeving, og sum ábyrgdarhavari mátti hann leggja kongin.

Tað er eingin ivi um, at søgunnar dómur verður, at Signar á Brúnni var maðurin, sum bjargaði politisku skipanini í Føroyum. Fekk reinførið innaftur í kervið, tetti lekarnar ímillum vøldini, manifesteraði eina byrjandi rættartrygd, trimmaði umsitingina, styrkti harvið støðuna hjá Føroya Løgtingi og gjørdi tað, at fólkið fekk álitið aftur, soleiðis at fullveldið av nýggjum fekk vind í seglini sum ein álitisvekjandi framtíð fyri borgarar landsins. Sum tann durkdrivni og skilagóði politikarin, sum ongin hevur kunnað skalað í meira enn fjórðingsøld, skal tað vera løgið, um hann ikki situr sum tingmaður og ráðharri heilt inn í elliár…«

Men tað, sum undrar meg og mong onnur tjóðveldisfólk er, hvussu tað ber til, at henda hetjan Signar, ið tit tá gjørdu hann til, ikki verður eftirspurdur, nú ið boð vóru eftir tí fjórða landsstýrismanninum í mentamálum undir sitandi samgongu. Málsøkið kennir hann.

Tað, ið er hent síðan Høgni úttalaði seg fyri Sosialinum, Óli helt formansfrágreiðingina og Tobbi skrivaði um sjónvarpsmálið er, at Signar á Brúnni er reinsaður fyri tær skuldsetingar, ið vórðu settar ímóti honum. Kanningarstjórin kom til hesa niðurstøðu:

»at avgerðin hjá landsstýrismanninum var í samsvar við tær lógir og reglur, sum eru galdandi fyri útgjaldi úr landskassanum, herundir ta játtanarskipan, sum er ásett í fíggjarløgtingslógini«.

Hetta má væl merkja tað, at tann stóra hetjan, ið tit gjørdu Signar til á vári 2000, má verða uppaftur størri, eftir at verða reinsaður. Hvussu ber tað nú til, at Høgni og Óli leypa frá tí avtalu, ið gjørd varð við landsstýrismannin tann 28. mars ár 2000, væl stuðlaðir av Torbirni??

Hvat verður søgunnar dómur um leiklut teirra í sambandi við setanina av nýggjum landsstýrismanni í mentamálum?

Annað, ið undrar meg er, at tá ið nú talan varð um ein suðuroying, hvussu ber tað so til, at formaður floksins Høgni Hoydal ikki ráðførir seg við umboð floksins á tingi úr Suðuroy, Hergeir Nielsen, ið hevur verið tingmaður í 15 ár, harav nøkur ár sum landsstýrismaður í skúlamálum, áðrenn hann kemur við einum uppskoti?

Somuleiðis eru tað mong, ið spyrja, um eingin kvinna var í uppskoti, nú landsstýrismaður skuldi veljast fyri fjórðu ferð undir hesari samgonguni. Høgni hevði bert tað eina uppskotið, meðan aðrir reistu spurningin um val av kvinnu í nevnda sess. Men tað vann ikki frama.

Eg helt, tað vera rætt at gera hesar viðmerkingar til nevnda val, eftir at hava fingið nógvar fyrispurningar frá fólki.

Eg meini tað!

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## DAGSINS MEINING

# Søguligur sigur - sigur fyri samhaldsfesti

Fyri fyrstu ferð í søguni hjá bretska arbeiðaraflokkinum endurvann hann stjórnarvaldið á einum parlamentsvalið. Tað merkir, at Tony Blair og flokkur hansara fáa í hvussu er fýra ár afturat at uppbyggja og umskipa bretska samfelagið frá einum djúpt konservativum klassasamfelagið til eitt meiri nútímans vælferðarsamfelag. Hetta vísti valúrslitið, og hetta er tað, sum tann bretski veljarin letur koma fram, tá tosað verður aftur og fram um samfelagsskipanir.

Valúrslitið vísir greitt, at tann vanligi bretin vendir sær frá tí konservativu samfelagsskipanini. Ikki bara tann vanligi løntakarin, gamli arbeiðaraklassin, men eisini meðalklassin, sum er betri fyri. Og her liggur kjarnin til valsigurin hjá Labour-flokkinum fyri fýra árum síðani. Hann fekk tann avgerandi meðalklassan í sín part, og tann stóri meðalklassin valdi aftur hesuferð Labour, tí hann vil hava eitt samfelag fyri øll.

Men hvørki hesin, ella seinasti stórsigurin hjá Labour, komu av sær sjálvum. Lykilin var ein umskipan í flokkinum. Var tað ikki eydnast teimum meiri miðsøkjandi yngru kreftunum í flokkinum at fáa leiðsluna í flokkinum, hevði hann verið runnin í stein, og havt torført at komið í stjórn aftur. Men tað ótrúliga hendi, at Labour vann ikki bara aftur, men at sigurin er líka so stórur sum seinast, og tað er ein sensatión í sjálvum sær.

Tað er sum afturljóð frá farnum tíðum, tá vit nevna orðið klassasamfelag, men í mangar mátar er Ongland framvegis landið hjá teimum privelegeraðu. Men her ein broyting, og í dag hevur bretski veljarin fyrst og fremst áhuga í at fáa tey dagligu viðurskiftini sum íbúðavirðurskifti, heilsuverk og skúlaskap upp á eitt hægri stig, so Bretland kann sametast við vælferðarsamfeløgini í Norðurlondum og tey fremstu ídnaðarlondini í Evropa.

Vit hava politisk rák, og ikki skerst burtur, at vit hava havt eitt sosialdemokratiskt rák seinastu árini. Sosialdemokratiskar stjórnir sita í flestu londum í Evropa og í næstan øllum ES. Borgarigu stjórnirnar, sum grundaðu politikk sín á monetaristiska búskaparpolitikkin, kundu ikki nøgta samfelagsliga tørvin hjá tí vanliga borharanum. Gongdin í Evropa og valúrslitið í Bretlandi er aftur eitt boð um, at evropeiskir veljarar sláa mannagrð um ta samhaldsføstu hugsjónina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eg meini tað –

**Signar á Brúnni**



Nú nýggjur landsstýrismaður í mentamálum er valdur, eru tað mong, ið hava spurt meg, hví eg ikki tók av tilboðnum um at fara í landsstýrið aftur, um orsøkin var hon, at eg ynskti ikki, at nú fráfarni landsstýrismaðurin ikki skuldi gerast tingmaður í mítt stað. Til hetta er at siga, at eg havi ikki fingið tilboðið, soleiðis sum mær varð lovað tann 28. mars ár 2000, tá eg segði meg frá sum landsstýrismann, orsakað av tí nógv umrødda sjónvarpsmálinum.

Tað eru eisini tey, ið spyrja, um eg nú veruliga fekk hetta lyfti, ið eg havi nevnt fleiri ferðir. Eg skal enn einaferð taka uppaftur, at tað varð mær lovað, og tað var nógv frammi í fjølmiðlunum tá.

Áhugavert er at lesa ymiskt av tí, ið tá varð sagt av m.ø. tjóðveldismonnum. Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, segði við Sosialin:

»Hevur hann ikki gjørt nakað skeivt, so eigur støðan at vera nullstillað og Signar á Brúnni settur í landsstýrisstarvið«.

Beint eftir at eg var farin úr landsstýrinum, var flokssting Tjóðveldisfloksins hildið í Vágum, og sum væntandi var, varð hetta ólukkumál umrøtt. Serliga áhugavert er at lesa tað, ið táverandi formaður í aðalstjórn floksins, vegna aðalstjórnina, Óli Holm, hevði at siga. Skal bert taka brot úr frágreiðingini:

»Tá so eitt mál av so prinsipiellum karakteri sum sjónvarpsmálið kemur í ljósmála, har ivi verður sáddur um embætisførsluna hjá landsstýrismanni okkara í Undirvísingar- og Mentamálum, er umráðandi, at ting- og landsstýrismanningin viðger hetta við tí neyðuga skynsemi og fyriliti. Vit føla okkum sannførd um, at Signar á Brúnni ikki medvitandi hevur borið seg skeivt at. Vit eru eisini fullgreið yvir, at einki vet av sjálvsøkni finnst í avgerðini hjá landsstýrismanninum um at flyta sjónvarpinum pening. Vit kenna til onnur mál, har landsstýrismenn hava verið úti í sera ivasomum avgerðum. Vit eiga hinvegin eisini at hugsa um, at flokkur okkara er slóðari fyri eini gongu, ið setir alt sítt álit á okkum og førleika okkara at veita fullveldinum Føroyar ta neyðugu rættartrygdina og vera tí eisini noyddir at ganga á odda at taka tær neyðugu avleiðingarnar, tá minsti ivi verður sáddur um brot á rættartrygdina.

Signar hevur við ósjálvsøkni avgerð síni skapt stóra virðing millum manna fyri flokkinum eins og sínum egna persóni og vil framyvir standa sum undangongumaðurin, ið vísti neyðugu virðingina fyri løgum og rættartrygdum landsins. Tílíkt skapar virðing, tryggleika og álit á, at vit hava neyðuga førleikan at taka ábyrgd av framtíðarsamfelagi okkara.» (sitat endað)

Kann ikki lata vera við at endurgeva brot úr grein, ið Torbjørn Jacobsen skrivaði um hetta mundið, ið var eitt aftursvar til Dagfinn Danbjørg, sum ikki heilt er ólíkt tí, ið aðalstjórn floksins bar fram í Vágunum. (Eg endurgevi).

»Tá ið Signar heitti á løgmann um at verða loystur úr starvi, skrivaði hann søgu. Og við hesi avgerðini kemur hann at standa sum ein varði í politisku søguni – til ævigar tíðir. Alt kann tykjast eitt sindur órógvandi í løtuni. Maðurin handlaði ivaleyst út frá vánaligari ráðgeving, og sum ábyrgdarhavari mátti hann leggja kongin.

Tað er eingin ivi um, at søgunnar dómur verður, at Signar á Brúnni var maðurin, sum bjargaði politisku skipanini í Føroyum. Fekk reinførið innaftur í kervið, tetti lekarnar ímillum vøldini, manifesteraði eina byrjandi rættartrygd, trimmaði umsitingina, styrkti harvið støðuna hjá Føroya Løgtingi og gjørdi tað, at fólkið fekk álitið aftur, soleiðis at fullveldið av nýggjum fekk vind í seglini sum ein álitisvekjandi framtíð fyri borgarar landsins. Sum tann durkdrivni og skilagóði politikarin, sum ongin hevur kunnað skalað í meira enn fjórðingsøld, skal tað vera løgið, um hann ikki situr sum tingmaður og ráðharri heilt inn í elliár…«

Men tað, sum undrar meg og mong onnur tjóðveldisfólk er, hvussu tað ber til, at henda hetjan Signar, ið tit tá gjørdu hann til, ikki verður eftirspurdur, nú ið boð vóru eftir tí fjórða landsstýrismanninum í mentamálum undir sitandi samgongu. Málsøkið kennir hann.

Tað, ið er hent síðan Høgni úttalaði seg fyri Sosialinum, Óli helt formansfrágreiðingina og Tobbi skrivaði um sjónvarpsmálið er, at Signar á Brúnni er reinsaður fyri tær skuldsetingar, ið vórðu settar ímóti honum. Kanningarstjórin kom til hesa niðurstøðu:

»at avgerðin hjá landsstýrismanninum var í samsvar við tær lógir og reglur, sum eru galdandi fyri útgjaldi úr landskassanum, herundir ta játtanarskipan, sum er ásett í fíggjarløgtingslógini«.

Hetta má væl merkja tað, at tann stóra hetjan, ið tit gjørdu Signar til á vári 2000, má verða uppaftur størri, eftir at verða reinsaður. Hvussu ber tað nú til, at Høgni og Óli leypa frá tí avtalu, ið gjørd varð við landsstýrismannin tann 28. mars ár 2000, væl stuðlaðir av Torbirni??

Hvat verður søgunnar dómur um leiklut teirra í sambandi við setanina av nýggjum landsstýrismanni í mentamálum?

Annað, ið undrar meg er, at tá ið nú talan varð um ein suðuroying, hvussu ber tað so til, at formaður floksins Høgni Hoydal ikki ráðførir seg við umboð floksins á tingi úr Suðuroy, Hergeir Nielsen, ið hevur verið tingmaður í 15 ár, harav nøkur ár sum landsstýrismaður í skúlamálum, áðrenn hann kemur við einum uppskoti?

Somuleiðis eru tað mong, ið spyrja, um eingin kvinna var í uppskoti, nú landsstýrismaður skuldi veljast fyri fjórðu ferð undir hesari samgonguni. Høgni hevði bert tað eina uppskotið, meðan aðrir reistu spurningin um val av kvinnu í nevnda sess. Men tað vann ikki frama.

Eg helt, tað vera rætt at gera hesar viðmerkingar til nevnda val, eftir at hava fingið nógvar fyrispurningar frá fólki.

Eg meini tað!

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.